# Takk mín Jesus fyri dýra blóð

**VERS 1**
Eg - var eitt vrak
Tá eg hugsi hvør eg var
Uttan sjón, uttan vón
Móti glatan lív mítt bar.

**VERS 2**
Synd - okkum skilti
Tí gjógvin var ov stór
Men hinumegin víða skarið
Tú fylgdi hvar eg fór

**Vers 3**
Brúgv - tú mær bygdi
Yvir syndarinnar skarð
Tína dýrd - ofraði
mær dýrd í hjarta bar

**VERS 4**
Tann skuld-  sum var mín
Á krossin negldi tú
Okið breyt, sál mín frí
fekk nýggja vón og trú

**NIÐURLAG**
Takk mín Jesus fyri dýra blóð
Takk mín Jesus sál mín hvít sum snjó
Takk mín Jesus at tú frelsti meg
Førdi meg úr myrkri inn í dýrdar ljós

**VERS 5**
Tú - tókst mítt pláss
Tá í syndagrøv tú lá
Har í stríði fyri meg
Triðja dag vann deyða á

**VERS 6**
Deyðin er - uttan brodd
og lívið ævigt er
eitt nýtt og umbroytt lív
lambsins blóð mær ber

**BRÚGV**
Tað er einki størri
enn tann kraftin sum títt dýra blóð mær ber,
títt blóð
Títt barn og tú mín faðir, tú meg keypti dýrt
og rindaði við blóð, títt blóð